## Kerry er ráðgevi

John Kerry er hvørki ráðharri ella sendiharri, men kortini er hann vorðin óalmennur ráðgevi hjá Barack Obama, forseta, tá tað snýr seg um uttanríkispolitisk viðurskifti. Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Robert Gibbs, sigur við AP, at John Kerry hevur drúgvar royndir og hollan kunnleika, tá talan er um uttanríkispolitikk og veðurlagspolitikk, og at forsetin er fegin um at fáa góð ráð frá honum. Í síðstu viku var John Kerry í Afghanistan, og hildið verður, at tað var hann, sum fekk Hamid Karzai, forseta at góðtaka eitt valumfar afturat fyri at fáa staðfest, hvønn afghanar vilja hava til forseta.



## Ættarhøvdingi Saddams tikin

Myndugleikarnir í Irak hava handtikið leiðaran í ættarbólkinum hjá fyrrverandi einaræðisharranum Saddam Hussein, tí hann skal hava hjálpt uppreistrarmonnum har norðuri í landinum við pengum. Tíðindastovurnar skriva, at irakskir hermenn og amerikanskir ráðgevar tóku Hassan Albu Nasir í heimi hansara í býnum Baiji, sum er nærhendis Tikrit. Ein sonur hansara varð eisini tikin. Sambært skuldsetingini skulu teir báðar hava hjálpt sunnimuslimskum felagsskapum og Al Qaeda við pengum.

# Tekur tú avbjóðingina – ella tekur avbjóðingin teg

**- Ein fyritøka við virðing fyri sær sjálvari kennir sína søgu og fær hana felda niður í ein bókling ella í bevístheitina hjá fólki. Vit kunnu eisini siga, at ein fyritøka við virðing fyri sær sjálvari og sum ynskir at hava eitt langt lív lagað, setir í starv fólk sum kunnu gera, at søgan verður dagførd sum nútíðarsøga eftir nútíðar tilverugrundarlagi. Romantiskar søgur við ongum nútíðarperspektivi avspegla ein tilverutrupulleika, sum elvir til aðrar trupulleikar og tømir fyritøkuna fyri tileggjan og orku, segði bispur í fyrilestri í Løkshøll**



*Vinnulívsfólk tóktust samd um, at bispur hevur nakað at geva føroyskum vinnulívi. Her heilsast Jónsvein Knudsen, vinnulívsmaður og bispur á gólvinum í Løkshøll*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**FAROEXPO**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Onkustaðni í havsbrúnni hóma vit sólina, og havsbrúgvin letur seg upp sum ein møguleiki. Positiv orð og handlingsfræsli til ytstu mørk. Vit mugu taka møguleikan, vit mugu verða við upp á nótarnar og syngja eitt nútíðar og nútímans lag.

Tað segði Jógvan Fríðriksson, bispur, tá hann byrjaði sín fyrilestur í Løkshøll mikudagin.

Hann legði aftrat, at onkustaðni í havsbrúnni síggja vit myrk skýgg, og havsbrúgvin við sínum hóttandi myrkri ger tilveruna ótrygga. Vit merkja, at skýggini eru óhugnalig. Vit mugu verða við upp á nótarnar og syngja eitt óhugnaligt lag.

- Havsbrúgvin verður ein fyrimynd, og tilveran í tí heimliga líkist smáu nyttugu finnunum í einum talvi. Tá grundarlagið undir fyritøkuni verður skipað uttanífrá, vantar fyritøkuni sál, framfýsni og áræði, legði hann aftrat.

### Søga og samleiki

- Tað er neyðugt at fyrihalda seg til havsbrúnna – tað, sum kemur uttanífrá. Men spurningurin, sum beinanvegin tekur seg upp, er: Í hvussu stóran mun hevur tann næra tilveran tilverurætt, og hvørja "prismu" brúka vit sum lykil, tá vit svara spurninginum?

Jógvan Fríðrikson segði, at tá vit standa yvirfyri avbjóðingum, er tað ein fyrimunur, at vit kenna okkara søgu, okkara samleika og okkara grundleggjandi virði.

- Tað er í tí heimliga, í nærumhvørvinum og í fyritøkuni, at tær stóru avgerðirnar verða tiknar. Avgerðin og avgerðarstundin liggur í tí heimliga partinum. Ein fyritøka, sum ikki út í æsir kennir og greinar motivatiónina, síni mál og sína søgu, møtir sjáldan avbjóðingini sum ein aktivur "aktørur". Í staðin verður fyritøkan tá møtt við teimum avbjóðingum, sum koma uttanífrá.

Bispur segði, at tá vit standa yvirfyri avbjóðingini, er tað avgerandi, at vit eru aktivir viðspælarar.

- Tá fyritøkan veksur, er tað ein fyrimunur, at vit halda okkum til eina handlingsætlan í staðin fyri at verða tikin við í streyminum ella skiftandi tíðunum. Í niðurgangstíðum er tað ein fyrimunur, at vit verða verandi á "bananum" og ikki lata umstøðurnar gera, at vit enda á beinkinum.

Jógvan segði, at tað er ein himmalvíður munur at møta avbjóðingunum – og at verða møttur við avbjóðingini.

### Dagførd søga

- Siðvenja og tað traditionella kann vera ein hollur